


Mynd: Sunva Ey. Lassen

*Gunnleif Danielsen frá bilstøðini Auto og Tummas Pauli Thomsen frá bilstøðini Bil Mini Taxi*

# Ólavsøkan er hæddarpunktið

**Hýruvognsstøðirnar fyrireika seg eisini til ólavsøkuna. Fólk skulu setast at passa telefonir og kioskirnar, eins og bilførararnir sjálvir eisini fyrireika seg væl, siga Gunnleif Danielsen og Tummas Pauli Thomsen, sum koyra frá hvør síni støð í høvuðsstaðnum**

**HÝRUVOGNAR**

*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hýruvognarnir eru ein partur av ólavsøkuni, sum vit ikki kunnu vera fyri uttan. Bæði fyri hýruvognsførararnar og hjá teimum mongu, sum gera nýtslu av hýruvognunum.

Hæddarpunktini hjá hýruvognsførarunum eru umframt ólavsøkuna eisini desember mánaði og fyrst í mai, tá fólk fáa feriupengar.

Vit hava hitt tveir hýruvognseigarar í Havn, sum koyra á hvør síni bilstøð: Gunnleif Danielsen frá bilstøðini Auto, og Tummas Paula Thomsen frá bilstøðini Bil Mini Taxi.

Báðir hava teir koyrt hýruvogn í nøkur ár. Gunnleif er annars útbúgvin møbilsnikkari. Í umleið 20 ár var hann ein teirra, sum rak bussar hjá Bussleiðini í Tórshavnar kommunu, og Tummas Pauli er útbúgvin prentari og arbeiddi í yvir 30 ár á Sosialinum.

Vit spurdu teir, hvussu bilførarar og støðirnar annars fyrireika seg til ólavsøkuna.

Bæði Bil Mini Taxi og Auto fyrireika seg til ólavsøkuna við at seta eykafólk inn at passa telefonirnar og kioskirnar.

Teir siga, at hæddarpunktini hjá hýruvognsførarunum eru umframt ólavsøkuna eisini desember mánaði og fyrst í mai, tá fólk fáa feriupengar. Fyri at fáa sum mest burtur úr ólavsøkuni, eru sum oftast tveir bilførarar á hvørjum bili, sum skiftast um at koyra, soleiðis at bilurin er í drift alla tíðina. Tí hevur tað stóran týdning at kekka bilin frá A til Z, áðrenn ólavsøkukoyringin byrjar, so einki óneyðugt stingur seg upp undir koyringini. Eitt nú er tað ein fyrimunur at hava góð dekk, so sleppast kann undan punkteringum, tí nógv glas er á vegnum.

Teir siga báðir, at fólk sum heild eru hampilig, og tað er sera sjaldan, at teir hava trupulleikar við fullum fólki. Tað er bara at duga at tosa tey til rættis.

Um kappingina millum støðirnar siga Gunnleif og Tummas Pauli, at sjálvandi kappast støðirnar um at geva kundunum best møguliga tænastu, men annars hava báðar støðirnar sínar egnu føstu kundar.

Veðrið hevur sjálvandi eisini týdning fyri, hvussu nógv er at gera. Um tað t.d. fer at regna, og øll skulu hava fatur á hýruvogni í senn, eru ikki altíð nokk av hýruvognum í býnum til at nøkta tørvin.

## Dýrur frensur

Bilførarar uppliva mangt og hvat, og uppgávurnar kunnu vera sera ymiskar. Gunnleif sigur frá eini hending, tá hann varð leigaður ein túr til Kollafjarðar eftir einum manni úr Norðoyggjum, ið var uppsteðgaður við bili sínum á veg til Havnar til djóralækna við frensinum, sum varð vorðin sjúkur.

Teir koyra til djóralæknan í Havn, har frensurin verður doyvdur og viðgjørdur. Meðan teir bíða, bjóðar maðurin Gunnleifi við sær at eta døgurða á eini matstovu í býnum. Teir avtala eisini við Brandstøðina, um at fáa tann uppsteðgaða bilin koyrdan á verkstað á Kambsdali.

Tá djóralæknin er liðugur at viðgera frensin, verður hann heintaður, og Gunnleif koyrir teir báðar til bilverkstaðið á Kambsdali, har maðurin fær at vita, at tann uppsteðgaði bilurin var ikki klárur. So teir víðari til Leirvíkar. Hetta var áðrenn koyrast kundi gjøgnum Norðoyatunnilin.

Tá maðurin stendur á kajuni í Leirvík við frensinum í hondini, heldur hann fyri "Um eg fari umborð við frensinum, verið eg hildin fyri gjøldur" og spyr um Gunnleif, um hann kann koma við bilinum yvirum. Teir so gera. Gunnleif var aftur í Havn um fimm-tíðina seinnapart. Túrurin byrjaði um 9-tíðina um morgunin.

Gunnleif sigur, at hetta var ein dýrur frensur. Umframt vanligu útreiðslurnar við Dúgvuni og koyring til Havnar, mátti maðurin gjalda fyri hýruvogn í ein heilan dag og flutning av uppsteðgaða bilinum til Kambsdal og verkstaðsrokningina fyri bilin. Bara hýruvognurin kostaði um 3.000 krónur.

Á ólavsøku hava hýruvognsførararnir loyvi at hækka takstin við upp til 25 prosentum, sama er galdandi aðrar tíðir sum t.d. annað jólakvøld og nýggjársaftan, siga Gunnleif og Tummas Pauli, sum báðir ætla sær at koyra ein stóran part av ólavsøkuni og ynskja øllum gestunum eina góða ólavsøku.